TING-HELLAN

*Framhald av síðu 39*

varð hildið at vera so týdningarmikið at forða fyri valdsmisnýtslu. Kortini hava seinni ættarlið av donskum embætismonnum og politikarum roynt at gera politiska spurningin um ríkiseindina til hægri lóg við at trýsta hann inn í grein 3 í grundlógini.

Seinasta greinin, danir siga hava serligan týdning fyri Føroyar og ríkiseindina, er grein 19 um uttanríkisvaldið. Á líknandi hátt sum við grein 3 siga teir, at tá grein 19 leggur heimildirnar at føra uttanríkispolitikk til kong, so kunnu Føroyar ikki fáa sjálvstøðugan lut í hesum valdi og sleppa tí ikki at fáa heimildir til at gera altjóða sáttmálar í egnum navni. Sum við grein 3 omanfyri, er eisini henda støða óhaldbar. Á grundlógargevandi ríkistinginum í 1848-49 og í 1953, tá greinin varð broytt, umrøddi grundlógargevarin einans greinina í sambandi við praktisku skipanina av valdsbýtinum uttanríkis millum ting og kong. Onki bendir á, at grundlógargevarin við grein 19 hevði eina meining um, hvørt samveldiskendar skipanir í framtíðini skuldu kunna taka seg upp innan karmarnar av ríkinum. Um Føroyar nú sum partur av danska ríkinum í 21. øld kunnu fáa ávísar heimildir at gera altjóða sáttmálar í egnum navni er støða, ið liggur langt uttan fyri endamálið við grein 19. Kortini nýttu danir júst grein 19 sum høvuðsgrundgeving, tá teir fyri stuttum sýttu føroyingum sjálvstøðugan lut í uttanlandsvaldinum.

### Kjak um umboðan Føroya á Ríkisdegnum

Ein tann mest áhugaverda hendingin til lýsing av upprunaligu fatanini av donsku grundlógini í mun til støðu Føroya var tá lógin um ríkisdagsumboðan føroyinga var fyri á Ríkisdegnum seint í 1850. Frammanundan hesum høvdu danir frá desember 1849 til mars 1850 tinglisið donsku grundlógina í Føroyum. Grundlógin var tí sett í gildi fyri Føroyar longu áðrenn, stóra málið um ríkisdagsumboðanina kom fyri. Kjakið á Ríkisdegi váttaði eisini, at støða Føroya í danska ríkinum var ein spurningur um politiskt val og ikki um ásetingar í grundlógini. Meirilutin av ríkisdagsmonnunum hildu, at Føroyar áttu at verða umboðaðar á Ríkisdegnum, men teir søgdu ikki, at hetta mátti verða so orsakað av eini grundlóg, sum stutt framman undan var lýst at galda eisini í Føroyum. Kent er íkastið til hetta kjak frá manninum, sum skrivaði uppkastið til grundlógina, D. G. Monrad (sí t.d. Jákup Thorsteinsson, Et Færø som Færø). Monrad var heitur talsmaður fyri føroyskari umboðan á Ríkisdegnum, tí hetta hevði tætt samband við spurningin, um Danmark skuldi verða eindarríki (helstat) ella ikki. Men Monrad vísti ikki til nýggju grundlógina, tá hann talaði til frama fyri føroyskari umboðan á Ríkisdegnum. Monrad fór í staðin heilt aftur og tillagaði eitt brot frá teirri júst avtiknu kongalógini og nýtti tað sum hugsjónarligan stuðul fyri fatanini, at "...alle disse Lande og Provinser, altsammen, intet undtaget, udelt og uskiftet bør sig at være under Danmarks Konge og Danmarks Rigsdag..."

Greiðari enn hetta kann tað ikki lýsast, at grundlógin fyrstu tíðina ikki varð mett viðkomandi fyri støðu Føroya í danska ríkinum.

### Lógirnar um yvirtøkur og altjóða sáttmálar

Nú er so grundlógin aftur drigin fram. Í sambandi við yvirtøkulógina er hetta kanska ikki so politiskt vandamikið, tí danir hava nú hóast alt givið føroyingum rímiliga víðar ræsur, og mangt ber til, sum fyrr ikki bar til. Tað undrunarverda - og ikki sørt háðandi - er kortini, at danir nú teoretiskt eru farnir aftur um 1948. Upp til heimastýrislógina vóru tað bara loynilig forarbeiði frá Alf Ross, sum søgdu nakað um eindarstat og delegatión, og at hetta skuldi fylgja av grundlógini. Sjálvur lógarteksturin og almennu donsku viðmerkingarnar tosaðu kortini um lóggevandi vald til heimastýrið, og tá loynilig forarbeiði ikki kunnu vera við til at skapa rætt í demokratiskum samfelag, so var støðan í 1948 kanska ikki so galin. Men nú í 2005 eru danir slopnir alment at skriva hesa fatan av ríkiseind og delegatión inn í viðmerkingar til yvirtøkulógina.

At teir karmar fyri innlendis sjálvstýri Føroya, ið upprunaliga skuldu liggja fastir orsakað av grundlógini, nú við yvirtøkulógini eru munandi víðkaðir, sigur ikki so lítið um opportunistiska grundlógartulking. Men tað sigur enn meira um retoriska potentialið í orðinum (grund)lóg, at teir nú so brádliga víðkaðu karmarnir fyri yvirtøkum framvegis verða sagdir treytaðir av ríkiseind og grundlóg.

Lógin um heimildir hjá landsstýrinum at gera altjóða sáttmálar vísir at grundlógarstrategiin umframt formligar eisini hevur politiskar avleiðingar. Við at ákalla grein 19 í donsku grundlógini forðaðu danir fyri, at Føroyar fingu (lutvíst) sjálvstøðugar heimildir at gera altjóða sáttmálar í egnum navni. Sum nevnt omanfyri er tað ikki rætt, at grein 19 má skiljast sum ein forðing á hesum øki. Meiri sannlíka orsøkin til hesa donsku støðu er, at tað onga aðrastaðni enn á uttanríkisøkinum er av størri týdningi fyri sjálvsfatanina hjá statinum, at umheimurin sær Danmark sum eina homogena eind og møtir einum donskum stati, einum "Kongeriget Danmark". Lótu danir vera við at draga grein 19 inn í samráðingarnar, og fylgdu teir fordømum aðrastaðni, so kundu Føroyar sum eitt slag av deilríki í danska ríkinum fingið eina heimild til í egnum navni og á lægri politiskum stigi at gera sáttmálar við onnur lond og altjóða stovnar; men hetta vildu teir ikki.

### Donsk grundlógarmentan

Vit kunnu seta spurningin, hvussu støðan hevði verið, um danska grundlógin eftir sínum innihaldi og einstøku greinum var viðkomandi fyri støðu Føroya í ríkinum. Svarið er, at heldur ikki tá hevði verið rímiligt at ákalla grundlógina sum týðandi grundgeving fyri ikki at vilja flyta seg longur. Danska grundlógin er, sum leiðandi danskur søgufrøðingur segði, fyrst og fremst eitt magna carta (frælsisskjal) fyri danska fólkaræðið. Við grundlógini fekk modernaða danska fólkaræðið sína formligu byrjan. Tí kann grundlógin hava týdning í Danmark sum politiskt skjal og ímynd, men týdningurin av henni sum hægri lóg er lítil og ongin. Danska grundlógin er aldri fatað so, at hon setir greið mørk fyri, hvat politiska skipanin kann og ikki, heldur er hon mett sum ein kámur karmur um politisku skipanina, eitt útgangsstøði, sum ikki setur nøkur endalig mørk.

Samanumtikið er tað tí als ikki legitimt, at danir ákalla grundlógina, tá teir ikki vilja politiskt. Størsti trupulleikin er kortini, at føroyingar ikki duga at vera við í hesum retoriska leiki, og tí megna teir ikki í eini samráðingarstøðu við danir at mana grundlógina burtur aftur.

*Høvundin er skrivari í nevndini at skriva føroyska stjórnarskipan (grundlógarnevndini). Danska lógarritið Juristen kunngerð í komandi viku grein hjá Bárði um danska grundlógarargumentatión.*

# Føroyar kraftsentur ella útoyggj?

TINGHELLUKLUMMAN

*Thomas Arabo*



### Útoyggjatrupulleikar

Útoyggjafelagið hevði fund nú um dagarnar. Teir nógvu av trupulleikunum, sum vit hoyra um eru væl kendir. Teir náttúrugivnu er ikki nógv at gera við, men har eru eisini aðrir møguleikar, ið kunnu loysast, um samfelagið lyftur í felag. Vit mugu eisini minnast til, at tað at búgva á útoyggj, tað skal ein eisini hava hug til, og tey, sum hava hugin mugu so fáa best møguligu fyritreytir.

### Kundi verið verri

Samferðsla og samskifti eru fyritreytir, sum eru heilt avgerandi fyri at tað er verðandi á útoyggj. Samferðslan, ið fyrr var á privatum hondum, er ótrúligani nógv batnað síðan tað almenna tók yvir og veganetið samsvarandi. Um tað almenna ikki fyri nógvum árum síðan tók sær um reiggj, og setti hesi tingini uppá pláss, so hevði verið øskukalt á mangari útoyggj í dag. Niðurstøðan má so verða at liberalisman ella privata fyritakssemið kann ikki nýtast at tryggja fyritreytirnar fyri búseting og virksemi á útoyggjunum.

### Føroyar sum útjaðari

Tað skerst ikki burtur at Føroyar sum land er útjaðari í Europa. Verðins nalvi eru vit so ikki. Gjøgnum árini hava vit so arbeitt okkum fram til at hava góðar fyritreytir fyri at virka á altjóða pallinum ájavnt við øðrum framkomnum tjóðum. Vit hava vælútbúgvið fólk, bæði frá lívsins og øðrum skúlum. Vit hava góð flutnings og samskiftisnet. Og síðst, men avgjørt ikki minst, so hava vit sum føroyingar ræðisrætt á hesum.

### Ræðisrætturin á samskiftinum - ein fyritreyt fyri frælsi

Hetta hevur tikið tíð og stríð at fingið hendan ræðisrætt. Tí er tað særandi at hoyra okkara ungu politikarar í sjónvarpi - ja enntá ferast til London og fortelja at hettar er nakað sum vit bara selja til hægstbjóðandi. Frælsi kann vera so nógv, men í mínari verð er tað at kunna virka og búgva í hesum landinum, uttan at aðrir enn føroyingar skulu avgera nær, hvar og hvussu eg sleppi til og frá og nær eg tosi við hvønn. So hesin ræðisrætturin má ikki missast.

### Reindyrkaðu ismurnar ónýtuligar

Kommunisman spældi fallit í Eystureuropa. Tað var gott. Hon kom tíbetur ongantíð higar - steðgaði í Keypmannahavn á vegnum. Nú er tað tann høgravenda isman, vit skulu ansa eftir. Hon er her - vit møta henni hvønn dag við brúkaragjøldum bæði her og der.

Eitt tað mest ótrúliga dømi var nú um dagarnar tá ein almennur fundur var í Norðurlandahúsinum, har kunnast skuldi um ES.

Kostnaður 1000 krónur! Og vit sum royna at kunna fólk við ókeypis fundum fáa illa nokk fólk at møta.

Hettar má so hava verið ein fundur fyri "elituna", og palliba má so bíða eftir hvat "elitan" meinar, hann skal meina.

Ja, eg meini tað - fínt skal tað vera.